# Bilar

Nr. 108 • hósdagur • 12. mai 2003 • 77. árg.



# Fyrsti evropeiski Mazda komin



*Mazda 2 er fyrsti Mazda, sum er gjørdur í Europa*

**Í farnu viku kom fyrsti Mazda2 til landið. Bilurin, ið avloysir Mazda Demio, verður gjørdur í Valencia í Spania. Mazda2 verður gjørdur sum hatchack við fimm hurðum og fæst í útgávunum: LX, GLX og Sport**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Síðst í januar varð bilredaktiónin á Sosialinum boðin við til Barcelona í Spanien, tá nýggi Mazda2, sum verður gjørdur í Valencia, varð frumsýndur fyri evropeiskum Mazda bilhandlarum.

Mazda2 er ein heilt nýggjur bilur, sum verður gjørdur á somu verksmiðju í Valencia sum t.d. Ford Fiesta, tað eru tó japanskir verkfrøðingar, sum skipa fyri menningini og framleiðsluni av Mazda2. Bilurin er gjørdur í sama stýli sum Mazda6 hvat viðvíkur designi og innrætting við t.d. alulook á instrumentborðinum. Talan er um ein 5 persónabil við 268 litra viðførisrúmi, tá baksetrini verða løgd niður er viðførisrúmið 1.044 litrar. Lessihæddin aftan er lág, umleið 50 cm, so lætt er at leggja størri lutir inn í bilin. Um baksetrini og høgra forsetur verða løgd fram, er pláss fyri tveimum súkklum í bilinum. Innan er eisini gott pláss, Tað er ein frøði at hava onkrar lutir at leggja frá sær tí bilurin hevur skuffur, hillar og rúm allasatðni, og bilurin er góður at koma inn í. Nakkapúturnar aftan kunnu koyrast heilt niður, so tær ikki taka útsýnið aftur eftir, tá tær ikki eru í brúk.





*Lessihæddin aftan er lág, umleið 50 cm, so lætt er at leggja størri lutir inn í bilin*

## LX, GLX og Sport

Mazda2 fæst í útgávunum LX, GLX og Sport. Í standard útgávuni, LX hevur hann t.d. fjarstýrt sentrallás, hita í forsetrunum og radioskipan, sum verður fjarstýrd frá rattinum. GLX útgávan hevur el-síðurútar framman og aftan, el-síðuspegl við hita, tokulyktir og seks hátalarar. Í Sport útgávuni hevur hann sportinntrekk, leðurratt og 15" alu-felgur.

Bilurin fæst við hesum bensinmotorum: 1,25 litur við 75 hk, 1,4 litur við 80 hk og 1,6 litur við 100 hk. Hann fæst eisini við 1,4 litur common-rail dieselmotori við 68 hk, hesin er sera orkusparandi, hann koyrir heilar 22,0 km/l. Trygdin er eins og í størri bilum við t.d. ABS bremsuskipan og DSC (Dynamic Stability Control), airbag framman, í síðunum og gardinairbag. Mazda2 verður gjørdur sum ein praktiskur hatchback við 5 hurðum. Hjá Berg Motors vænta tey sær eins nógv av Mazda2, sum tey hava upplivað tað við Mazda6, ið varð sera væl móttikin.

## Mazda2 1,25i LX

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1, 25 litur 4 syl. bensin 75 hk |
| 0-100 km/t | 15,1sek |
| Bensinnýtsla | 15,9 km/l |
| Dekkstødd | 175/65R14 |
| Støddir og vekt | |
| Longd | 393,0 cm |
| Breidd | 168,0 cm |
| Hædd | 155,0 cm |
| Eginvekt | 1125 Kg |
| Viðførisrúm | 268 litrar |
| Prísur | kr. 146.700,- |
| Søluumboð | Berg Motors<br>Staravegur<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel.313535 |



# Ringe Karrosseri A/S – uppbyggja brand- og tilbúgvingarakfør



*Nýggi Ford 550 brandbilurin hjá Miðvágs – Sandavágs kommunum. Bilurin hevur innbygdan lyktapela*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Fyrst í apríl fingu kommunurnar í Miðvágs og Sandavági ein felags nýggjan brandbil. Bilurin kostaði 1,2 mió. krónur við allari útgerð. Partafelagið Vágatunnilin rindar umleið helvtina av bilinum, sum eisini skal brúkast um okkurt óhapp hendir í sambandi við tunnulin**

TILBÚGVING
*Magnus Gunnarsson*

Nýggi Ford 550 brandbilurin hjá Miðvágs og Sandavágs kommunu lýkur øll krøv sum brunalógin ásetur. Bilurin er ein Ford 550 4x4 við V8 turbo dieselmotori við intercoolara og 270 hk. Hetta er fyrstu ferð at Ringe Karrosseri A/S hava bygt ein amerikanskan bil um til brandbil. Bilurin bleiv keyptur beinleiðis úr USA og umbygdur til brandbil. Teir tóku bilin og skóru takið á førarahúsinum sundur heilt fram til forrútin og víðkaðu húsið við 15cm í hvørjari síðu, fyri at geva betur pláss til at tríggir roykkavarar kunnu sita á baksetrinum. Kassin aftan fyri húsið er innrættaður við ein 2000 litur vatntanga og bæði há- og lágtrýstpumpu. Ein teleskop ljósmastur kann skjótast upp úr takinum við trýstluft og ein trýbýttur stigi liggur omaná takinum, roykkavraútgerð er innbygt í setrini, so tað er skjótt og latt at lætta seg í tey, tað eru eisini tvær hátrýstslangur sum eru 60 m langar við strálirøri, sum ger tað møguligt at fremja eina skjóta sløkking. Hetta er bert nakað av tí, sum ein slíkur bilur er útgjørdur við. Har er annars alt sum brunalógin ásetur.

## Fleiri sýna áhuga

Ringe Karrosseri A/S er ein fyritøka í støðugari menning innan uppbygging av flutnings- og tilbúgvingarakførum. Tilsamans 15 fólk arbeiða í fyritøkuni. Brandbilurin til Miðvágs og Sandavágs kommunu er fyrsti bilurin teir hava bygt til Føroyar, men hann verður ikki tann síðsti, tí fleiri aðrar kommunur í landinum hava sýnt bilinum stóran áhuga og eru í ferð við at bileggja sær ein brandbil frá Ringe Karrosseri A/S. Ein fyrimunur við bilum í hesari støddini, er, at teir eru ikki ov stórir, samstundis sum teir eru kvikir og skjótir á staðið, tá brúk er fyri teimum. Umframt brand- og tilbúgvingarbilar umbyggja Ringe Karrosseri A/S eisini avlamisbilar og innrætta vørubilar.





*Bilurin verður umbygdur hjá Ringe Karrosseri A/S*
*Mynd.: Árni Jakobsen*



*Dagfinn Petersen úr Miðvagi er brandmeistari*
*Mynd: Edvard Joensen*

## Avensis fimm stjørnur



Nýggi Toyota Avensis hevur fingið fimm stjørnur í seinastu EuroNCAP krasjtestunum, og verður hann mettur sum tryggasti bilur í sínum klassa. Avensis er samstundis fyrsti bilur, sum hevur fingið fimm í stjørnur eftir nýggju strongu reglunum.
*Kelda. Motor Magasinet*

## Zafira designprís



Meira enn 46.000 lesarar av týsku bilbløðunum "AUTOStrassenverkehr" og "mot" valdu herfyri Opel Zafira til vakrasta bil. Hetta er fjórðu ferð, at Zafira er valdur sum tann bilirin í sínum klassa, sum hevur útsjóndina við sær.
*Kelda: GM Danmark*

## RX-8 Ársins motor



50 motorjournalistar úr 22 ymiskum londum, saman við blaðnum "Engine Technology International", hava valt Wankelmotorin í nýggja Mazda RX-8 til Ársins Motor 2003
*Kelda: Tíðindaskriv frá Mazda*